*Andaligi leiðarin í Tibet er Dalai Lama, sum livir og virkar í útlegd. Av tibetanum verður hann mettur at vera sjálv ímyndin av tibetansku fólkasálini. Hann er høgt í metum og verður umgyrdur við nógvari virðing og kærleika. Hjá nógvum er hann eisini ímyndin av friði, og hugburðinum um, at øll mál kunnu loysast við friðarligum midlum*



ur Lassen, sum beinanvegin heitti á vinmann sín, tónaskaldið Trónd Bogason, um at gera eina útseting av lagnum fyri kvinnurøddir, bass og solosang. Síðani varð tikið upp í Vesturkirkjuni, har kvinnuligir sangarar úr Tarira sungu undir.

- Eg ynskti at koma við einum norðurlendskum íkastið til útgávuna og tað endaði so við hesum lagnum, sum hevur eitt minimalistiskt og friðarligt ljóð. Og lagið hevur fingið sera góða móttøku frá útgevarunum, sum halda tað vera spennandi, at fáa okkurt við frá einum so fjarskotnum landi, sigur Teitur Lassen, sum eisini kennir Sunleif Rasmussen og kór hansara frá fyrr, og tí visti, at tað boðaði frá góðsku, at fáa tey við.

## Vælgerandi endamál

Men hvat fær ein tónleikari sum Teitur Lassen burturúr at luttaka í slíkari útgávu?

- Peningaliga fái eg onki. Alt yvirskotið fer til vælgerandi endamál, harav helmingurin til frælsisstríðið í Tibet og restin til aðrar felagsskapir. Vit solistar eru tí biðin um at velja okkum hvør sítt vælgerandi endamál at lata til eisini, sigur Teitur Lassen, sum ikki hevur funnið útav, hvør skal hava hansara part enn.

- Lagið hjá mær hevur verið nýtt í einum líknandi sambandið fyrr. Tað var í einum filmi um eina familju frá Cambodja. Hesin filmur fekk fleiri virðislønir, sigur Teitur, sum kortini viðgongur, at luttøka í slíkum arbeiði sjálvandi eisini gevur honum umrøðu sum tónleikari.

Teitur Lassen og Tarira koma ikki sjálvi í samband við øll tey kendu fólkini, sum eru við í verkætlanini – hvørki solistar ella Dalai Lama sjálvan.

- Men vinur mín Jónas Block Danielsen hevur hitt Dalai Lama, so tað man vera í lagi, sigur Teitur, og forklárar um ta ferðina Jónas skuldi við flogfarinum yviri í Norra.

- Tá hann setir seg á setrið, varnast hann eitt kent andlit undir liðini á sær. Tá er tað sjálvur Dalai Lama, sum situr har, sigur Teitur og flennir.

## Friðarligt mótmæli

Ítróttarfólkini, sum luttaka í OL, kunnu taka fløguna ókeypis niður av internetinum. Onnur, sum vilja stuðla arbeiðinum fyri friði, kunnu keypa hana í handlunum og á internetinum. Tað hevur tó verið frammi, at tað kann hava stórar avleiðingar við sær hjá ítróttarfólkunum, um tey á nakran hátt vísa ónøgd við kinesiska stýrið. Øll mótmæli kunnu hava við sær, at tey verða burturvíst frá leikunum.

- Men, taka tey stuðulsfløguna niður av netinum, kann ein iPod ella MP3-spælari vera eitt friðarligt, men sterkt, mótmæli móti kúgan og vantandi mannarættindi í Kina, herundir í Tibet, sigur Michael Wohl, leiðari fyri »The Art of Peace Foundation« í einum tíðindaskrivi.



## Kina í Tibet

Sambært teimum, sum stríðast fyri einum frælsum og sjálvstøðugum Tibet, hevur landið liðið nógv undir hersetingarvaldinum í Kina, sum hevur verið galdandi síðan 1949. Tibet er ikki til á heimskortinum og verður ignorerað av øðrum londum og av ST. Stjórnin, við Dalai Lama á odda, býr í útlegd í India og verður ikki tikin við í samráðingar um mál, sum snúgva seg um landið.

Allar avgerðir verða tiknar í Beijing, haðani landið verður stýrt. Tali-, skrivi- og pressufrælsið er nógv skert og miðlarnir eru statsstýrdir. Tibetanska fólkið livir undir strongum eftirliti, og ein vanlig revsing er, at senda fólk til "fosturlandsuppaling". Torturur er vanligur í fongslunum, har yvir 100 kendir politiskir fangar sita í løtuni. Ein stórur partur av mentanararvinum er lagdur í oyði. Eitt nú blivu 6259 klostur oyðiløgd í árunum 1954-1971. Eisini er strangt eftirlit við alt virksemið hjá klostrunum, og fleiri hundrað munkar og nunnur hava fingið forboð móti at koma heim aftur í klostrini, eftir at tey hava luttikið í mótmælistiltøkum. Eini 150.000 tibetanarar liva í útlegd og á hvørjum ári flýggja 2-3.000 til India eller Nepal. Harav eru nógv børn, sum vilja nema sær tibetandska útbúgving í útlegd. Ongi almenn tøl eru at finna um Tibet.

*Kelda: http://www.tibetkomite.dk/*